Árni Olafson, um marknaósemjuna við bretar:

Ein grá oljuleið er eingin patentloysn

Hon inniheldur eisini nógvar trupulleikar, so objektivt sæð er tað best við einum greiðum marki millum londini sigur formaðurin í føroysku samráðingarnevndini, sum fer til London 21. september at samráðast við bretar um markið

Fundurin millum Føroyar og Danmark øðrumegin og Bretland hinumegin um markið millum londini er nú ásettur at vera 21. september í London. Í hesum sambandi hevur formaðurin í nevndini, Árni Olafson havt fund við løgmann.

Árni Olafson vil einki siga um, hvat politisku myndugleikin í Føroyum heldur um gongdina ella hvat hann ynskir av nevndini til komandi samráðingar.

Tú hevur áður sagt, at okkurt skal henda í hesum árinum, soleiðis at vit kunnu siggja ljósið í endanum á tunnellini?

-Tað kann ein so sjálvandi framvegis vóna.

Árni Olafson heldur ikki, at tað stendur í botni í hesum samráðingum, hóast einki úrslit fyriliggur.

Uppá fyrispurning hvat hann hevur at siga til úttalilsini hjá løgmanni í Sosialinum eftir seinasta fundin í Føroyum, har hann vísti á, at bretar fáa ikki ein ein tumma av landssynningshorninum av føroyska landgrunninum sigur Árni Olafson, at tað eru politikararnir, sum bestemma linjuna.

-Hatta úttalilsi stendur løgmaður so aftanfyri, og eg kann ikki vera ósamdur við honum í tí.

Formaður í meira enn tvey ár

Árni Olafson hevur sitið sum formaður í føroysk-donsku samráðingarnevndini í halvtriðja ár. Vit spurdu hann um henda tíðin hevur verið til fánýtis, nú eingin loysn er funnin?

-Soleingi tveir partar sita við samráðingarborðið, kanst tú ikki siga, at tað hevur verið ein fiasko.

Hvat hevur Árni Olafson at siga til uppskotið hjá einum skotskum ráðgevarafelag til eina fyribilsloysn á ósemjuni við eini gráari leið.

-Tað er ikki nakað tú blankt kann vísa aftur, tí báðir partar eru hugaðir fyri, at okkurt verður gjørt. Men motparturin hevur fleiri ferðir sagt, at gott stik gevur góðar grannar. Objektivt er tað eisini tað besta.

Árni Olafson sigur, at slíkt sum gráar oljuleiðir er roynt aðrastaðni men tað er skeivt at ímynda sær, at hetta er nøkur løtt patentloysn. Tað inniheldur eisini trupulleikar.

Skal taka ta tíð tað má taka

Vit spurdu Árna Olafson um tað er umráðandi fyri komandi undirgrundarlóg og fyrsta útbjóðingarumfarið, at ein loysn verður í marknatrætuni.

-Tað er klárt, at tað hevði gjørt tað meira einfalt at luta út loyvi, um markið varð upp á pláss til ta tíð. Men kanst tú ikki tað, so verður tú bara noyddur til at liva við tí avmarkingini.

Eru vit nærri Haag nú enn fyrr?

-Tað er ein møguleiki, sum alla tíðina lúrir í bakgrundini. Tað tori eg ikki at útiloka nú heldur enn fyrr.

-Nú hevur tú sitið við hesum máli sum leiðari í góð tvey ár. Heldur tú tað fara at ganga eins nógv ár, áðrenn vit fáa eina loysn?

-Nú hava vit verið ígjøgnum teir flestu problemstillingarnar, so tað skuldi ikki verið orsøk til at brúkt so nógv meira av tíð.

Árni Olafson sigur annars, ein samráðing er meiningsleys, um ikki báðir partar slaka nakað. Harí liggur frá føroyskari síðu, at ein er villugur at slaka nakað í mun til ta føroysku útgávuna av fiskimarkinum.

Henda útgáva gongur longur eystur enn tann hjá bretum.

Vit spurdu Árna Olafson, hvussu gongur við spurninginum um Rockall og alt tað stóra økið sunnan fyri?

Hann sigur, at tað málið fyribils er parkerað úti á síðulinjuni sum minni hastandi.

Tað hevur verið frammi, at føroyska samráðingarnevndin átti at fingið sær serkøna útlendska ráðgeving.

Árni Olafson sigur, at hetta er ikki nakað, sum teir hava reklamerað við. Hann vísir tó ikki aftur, at teir hava slíka ráðgeving.

Bonnerup og oljan

Vit hava spurt formannin í føroysku oljuráðleggingarnevndini, hvat hann heldur um úttalilsið hjá formanninum í Ráðgevandi Nevndini, Erik Bonnerup um, at tað fara at ganga í minsta lagi 10 ár, áðrenn Føroyar fara at fáa nakað búskaparliga burtur úr eini komandi oljuvinnu.

-Tað er trupult at seta nakað áramál á, men eg trúgvi, at tað skal ganga sera væl, um tað skal koma nakað, sum munar, áðrenn 10 ár.

Árni Olafson er annars nøgdur við áhugan frá útlendskum oljufeløgum fyri føroyska økinum.

Hann fer næstu dagarnar at vera við á stóru altjóða oljuráðstevnuni í Aberdeen.

jan

---

fáa hjálp vegna sjúku, hjúnarskilnað o.a., so er tørvsmetingin frameftir galdandi.

Í staðin fyri tørvsmetning varð hjálpin til arbeiðsleys sett til 125 pst. av pensjónsupphæddini, umframt í-skoyti fyri hvørt barnið.

Virkar ikki nóg væl

Andreas Petersen sigur, at skipanin vegna arbeiðsloysi, við støði í pensjónsupphæddini, ikki hevur virkað so væl, serliga tá talan er um yngri fólk ella einsamallar mammur. Júst hesin bólkur hevur stórar trupulleikar við at svara hvørjum sitt.

- Tað stendur í samgonguskjalinum at forsorgarlógin skal endurskoðast í ár. Tá kanningin er av, verður mett, um vit skulu fara aftur til upprunaligu skipanina.

Spurningurin er, um tað er rætt at skilja millum arbeiðsloysi og aðra hjálp, og um ein tørvsmeting ikki skal gerast í øllum førum, sigur Andreas Petersen.

Nóg mikið

Í fjør vóru 35 mió. krónur avsettar á fíggjarlógini til forsorgarhjálp. Hesin peningur hevur hildið væl. Tað kemst einamest av at tíðin í ALS varð longd.

- Nú skulu vit kanna, hvussu nógv tað kostar at broyta forsorgarlógina aftur. Talan verður um meirútreiðslur, og vit vita, at partur av teimum, sum detta úr Arbeiðsloysisskipanini fara undir forsorgarlógina, men verri enn so øll, sigur Andreas Petersen.

Dagny

★ tíðarrit
★ reklamur
★ vøruroyndir
til øll húski
í Suðurstreymi!
Bóðtænastan
Tlf. 19782

Framtaksgrunnurin
Yviri við Strond 2
Postsmoga 3157
110 Tórshavn
Telefon 15966
Telefax 19139

Ringið!
- og vit skriva
11820

Tí er Sherwood RV-6030R besta keypið
Samanber við hini sløgini:
• Ektað Dolby ProLogic surround móttakari
• Einasti í prísflokkinum við fimm óheftum effektforsterkarum
• 2x139 W stereo útgangseffekt í 4 ohm
• 3x100 W + 2x33 W surround útgangseffekt í 4 ohm
• Klárt 11-tal fyri prísin
• Vekt 13 kg.
• Fjarstýring við klokku
Kostnaður.................... 5.995,-
LM-handilin
Smyrilsvegur 2 - Tlf. 11220 - Boks 3100